## Russar sita á trúnuni

Tíðin við USA sum maktfaktori í tungvektsflokkinum í nevaleiki tykist nú endaliga av. Ístaðin staðfesti Oleg Maskaev, at tað nú er Russland, sum situr á somu trúnu. Hann vann nevnliga dystin móti Hasim Rahman upp á tekniskt knock-out, tá dómarin metti amerikumannin hava fingið nóg mikið.

Sigurin ber við sær, at russar nú eiga heimsmeistaran í tungvekt hjá øllum fýra altjóða nevaleikasambondunum.

**-mørk**



## Solskjær aftur á landsliðnum

Hóast hann hevur verið burturi við skaða í tvey ár, so ivaðaist Åge Hareide ikki, tá hann skuldi taka sín landsliðshóp út til komandi avbjóðingina móti Brasil. Ole Gunnar Solskjær skuldi við í hópin.

Hetta var venjarin í Manchester United, Sir Alex Ferguson, alt annað enn fegin um. Hann vísti á, at Solskjær meira enn nakað hevur tørv á hvíld, men Hareide vildi hava áleyparan við kortini. Og tað fekk hann eisini. Solskjær segði alt fyri eitt, at hann fegin vildi við landsliðnum, og so kann norskur fótbóltur fegnast um, at ein av bestu spælarunum í fótbóltssøguni hjá landinum nú aftur kann tørna út fyri tjóðina.

# Ungi talvmeistarin á veg ímóti tindinum

**16 ára gamli Helgi Dam Ziska vann sær sín triðja altjóða talvnorm í kapping í Hollandi. Um Helgi skal kalla seg altjóða meistari, skal hann hava 2400 í rating**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*
*carl_eli@hotmail.com*

So gjørdi ungi havnarmaðurin aftur bart! Helgi hevur seinasta árið ment seg við óhoyrdari ferð. Í Politiken Cup í 2005 vann hann sær sín fyrsta norm. Í Reykjavík Open í mars leyp hann upp um fleiri forðingar (var sjúkur) og vann sær sín næsta norm. Bert eitt ár aftan á fyrsta IM-normin, hevur Helgi nú ognað sær sín triðja og seinasta norm í Vlissingen Open í Hollandi.

Beinhørð venjing, umframt talent og vilji, hevur hjálpt Helga á mál. Helgi hevur nú umleið 2360 ratingstig, og so skjótt sum hann røkkur 2400, verður hann kosin altjóða meistari.

Í Vlissingen møtti Helgi tveimum stórmeistarum og trimum altjóða meistarum umframt fýra telvarum við umleið 2000-2100 ratingstigum. 6,5 stig av 9 varð úrtøkan hjá Helga, og tað rakk til eitt deilt 12. pláss í sterku opnu kappingini, ið taldi 250 telvarar.

Faðir Helga, Andrias Ziska, fekk 4,5 stig, sum eisini var eitt gott úrslit.



*Bara 16 ára gamal vann Helgi Dam Ziska sín triðja IM-norm. Her tekur hann móti virðislønini fyri flotta avrikið*

Sterki polski stórmeistarin Michal Krasenkow vann við 8 stigum.

### Hóraði undan og tók møguleikan

Helgi var sum heild nøgdur við telvingina, tá ið vit tosaðu við hann stutt aftan á kappingina. Hann segði seg vera í vandasjógvi miðskeiðis í kappingini.

– 4. og 5. umfar vóru sera kritisk hjá mær. Eg møtti tveimum lægri rataðum telvarum, men var í stórum trupulleikum. Tíbetur vann eg hesi talv, og tá kendi eg meg hava møguleikan at røkka norminum, sigur Helgi.

Í 8. umfari hevði Helgi hvítt móti sterkum IM´ara við 2470 ratingstigum.

– Hetta var helst mítt besta talv í kappingini, og tað mest umráðandi, leggur Helgi aftrat.

Aftan á vakra sigurin skuldi Helgi í seinasta umfarinum hitta 13 ára gamla stórtalentið úr India, Parimarjan Negi, sum um tveir mánaðir verður kosin stórmeistari(!) á FIDE-kongressini. Fekk Helgi javnt, var triði normurin í skjáttuni. Og so varð. Helgi telvaði orkuríkt, djarvt og sera væl. Spennandi var at fylgja talvinum, ið varð varpað beinleiðis út í heim á netinum. Helgi var í roynd og veru ongantíð í vanda og fekk ein væl uppibornan javnleik.

### Ikki ráð at halda steðg

Í vár gjørdi Kaupthing samstarvssáttmála við Helga. Við sterkum stuðli í rygginum er og verður tað gjørligt hjá Helga at ferðast víða til sterkar talvkappingar, umframt at peningur kann nýtast til talvvenjarar.

– Eg eri ótrúliga nøgdur við samstarvið við Kaupthing. Eg fái nú møguleikan at menna meg og sleppa at gera tað, ið eg vil. Nevnliga at royna at blíva stórmeistari og verða fulltíðartelvari, sigur Helgi.

Helgi er júst farin í 10. flokk, og tí kann tað verða eitt sindur avmarkað, hvussu nógv hann kann telva komandi tíðina.

– Eg kann ikki loyva mær at hvíla í framgongdini, tí havi eg sett mær fyri at telva aftur í september og oktobur. Mín fyrsta kapping aftan á summarfrítíðina verður helst 5th Klaksvík International, sigur Helgi.

### Næsta málið

Viðvíkjandi ætlanini at ogna sær stórmeistaranormar væntar Helgi, at hann í fyrstu atløgu fer at halda fram á sama hátt, sum hann hevur gjørt fyri at vinna sær IM-normarnar. Helgi trýr nevniliga nógv á egin evni og sigur óbeinleiðis, at hann metir seg hava góðar møguleikar at blíva stórmeistari við at telva nógv og arbeiða miðvíst.

Spurdur um hann metir seg vera føroya besti telvari, er Helgi meira varin.

– Nei. Eg eri noyddur at koma upp á minst 2400 í rating, tí John Arni Nilssen hevur verið omanfyri 2400, umframt at hann longu er kosin altjóða meistari, sigur ein fegin ungur maður at enda.

## Talvið hesa vikuna

Ziska, Helgi Dam (2333) - Delemarre, Jop (2471) HZ Open Vlissingen (8), 11.08.2006

1.e4 e6 2.d3 (Helgi telvar varliga í fronsku byrjanini) 2...d5 3.Rid2 Rif6 4.Rigf3 b6 5.c3 Be7 6.e5 Rifd7 7.d4 (Nú líkist støðan einari vanligari støðu í fronskum) 7...c5 8.Bb5 a6 9.Bd3 b5 10.Rif1 (Rættiliga original og áhugaverd telving) 10... Ric6 11.Rig3 b4 12.Rih5 g6 13.Rif4 Fb6 14.Be3 bxc3 15.bxc3 cxd4 16.cxd4 Fa5+ 17.Kf1 Rib6 18.h4 Bd7 19.a3 Fa4 20.Bc2 Fb5+ 21.Rid3 Ric4 22.Bc1 Fb6 23.Rb1 Fa7 24.Rib4 (Hvítur hevur sambært telduforritinum Fritz 9 lítlan fyrimun (+0.26) ) 24... Rixb4 25.axb4 h5 26.Rh3! (Rókurin fer í hernað) 26... Rb8 27.Rig5 Rxb4 28.Rxb4 Bxb4 29.Rf3 Bb5 30.Kg1 0–0 31.Rg3 Kh8? 32.Ff3 (Rixe6 er sterkari, men Ff3 er eisini vinnandi) 32...Fe7



TALVDIAGRAM
Støðumynd eftir 32…Fe7

33.Rih7!! (Helgi í essinum!) Rc8 [33...Kxh7 34.Fxh5+ Kg7 35.Bxg6 og svartur verður skák og mátaður eftir fáar leikir)] 34.Bg5 Rid2 35.Bf6+ 1–0

B68

Skála

B68-Skála 2-4 (1-3):

# Skjót staðfesting

**Skála punkteraði alt fyri eitt dystin á Svangaskarði leygardagin. Eftir fyrsta korterið stóð 0-3 á talvuni, og so kundi heimaliðið bara royna at pynta um úrslitið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gongur við fullari ferð framá hjá Skála. Sigurin á Toftum var tann triði upp í slag hjá liðnum, og í øllum førum er niðurflytingin nú fingin í trygga fjarstøðu.

Sjálvir søgdu Skálamenn undan dystinum á Toftum, at talan var um lykladyst, sum skuldi takast í størsta álvara, og tað tóktust gestirnir so sanniliga eisini at gera.

### Trý skjót mál

Tað tók gestunum bara níggju minuttir, áðrenn teir høvdu lagt seg á odda, tá Alexandur Johansen sendi bóltin í kassan. Tríggjar minuttir var sami maður aftur upp á spæl, og tá Jónhard Frederiksberg í næsta álopinum økti til 3-0, var leyst og liðugt.

Sjálvandi kom B68 betri við eftir hetta, nú Skála slepti takið á speedaranum nakað, men spenningu varð ongan tíð talan um. Kanska var ein lítil vón at hóma hjá vertunum, eftir at Súni Fríði Barbá minkaði um munin, men tá aftur landsliðsaktuelli Jónhard síðani økti til 4-1, varð yvirvágin staðfest.

### Álit á Anderson

Skuldi nøkur troyst finnast í úrslitinum hjá B68, so mundi tað vera, at brasilski Anderson nú aftur er á liðnum. Pappírini hjá honum komu í rættlag í farnu viku, og hóast tapið, so takkaði hann við at senda bóltin í meskarnar til 2-4. Í hesum førinum bara eitt mál, sum pyntaði um úrslitið, men samstundis eitt tekin um, at Anderson væl kann vera maðurin, sum álitið skal setast á, um B68 skal bumba seg úr botninum. Her verða dystirnir móti VB/Sumba og ÍF uttan iva lyklauppgerðir, men áðrenn nakar slíkur kemur á skránna, er talan tríggjar ferðir á rað um dyst móti ovari støddum liðum. Og tað fer at seta stór krøv til toftamenninar.

### Kaga uppeftir

Hjá Skáal er lagið øðrvísi betri. Teir hava nú prógvað, at laka byrjanin var ein stórur kiksari, sum kanska eisini var tengd at skaðum og aðrari fráveru. Nú eru skaðarnir burtur. Nenad Stankovic er aftur á miðvøllinum, og so er spurningurin, hvørt Skála longu hevur mist ov nógv, ella um liðið møguliga kann stríða seg enn longur upp enn sætta plássið, sum teir nú hava sett seg rættiliga tungt á.